gult12 cyan12 magenta12 svart12



FISKIVINNUTÍÐINDI

# Reiðarafelagið vil hava kanning

**Føroya Reiðarafelag fer at heita á landsstýrismannin við fiskivinnumálum um at skipa fyri kanning av russiska fiskiskapinum undir Føroyum**

FISKASTRÍÐ
*Eyðun Klakstein*

Á nevndarfundi í Føroya Reiðarafelag seinasta hósdag samdist nevndin um, at felagið skal heita á landsstýrismannin um at kanna russiska fiskiskapin eftir svartkjafti undir Føroyum.

– Vit vilja hava at vita, hvussu tað ber til, at russisku skipini fáa so nógvan kongafisk, hóast tey royna eftir svartkjafti, sigur Jákup Sólstein, formaður í Reiðararfelagnum.

– Vit fara at mæla til, at Fiskrannsóknarstovan gera eina neyva kanning av fiskiskapinum hjá russisku skipunum. Føroysku svartkjaftaskipini hava ikki sama trupulleika sum tey russisku, og tí halda vit, at tað er neyðugt við eini slíkari kanning.



*– Vit vilja hava at vita, hvussu tað ber til, at russisku skipini fáa so nógvan kongafisk, hóast tey royna eftir svartkjafti, sigur Jákup Sólstein, formaður í Reiðararfelagnum.*
*Mynd: Eyðun Klakstein*

### Fáa ov nógvan kongafisk

Seinasta árið er stór broyting hend í russiska fiskiskapinum eftir svartkjafti í føroyskum sjógvi. Í fjør góvu russisku skipini upp, at tey høvdu fiskað meiri enn 2500 tons av kongafiski, hóast tey ikki royna eftir hesum fiskaslagnum.

Samstundis hava føroysku lemmatrolararnir ikki fiskað meiri enn eini 5-6000 tons av kongafiski undir Føroyum, og tí hava russar fingið stóra nøgd av kongafiski, hóast teir royna eftir svartkjafti.

Skiparin á Bresti, Bjarki Berg, reisti málið um russisku trolararnar í Sosialinum fyri 10 døgum síðani. Hann vísti á, at føroysku lemmatrolararnir fáa ikki fiska fyri russisku svartkjaftaskipunum.

Jørgin Niclasen, landsstýrismaður við fiskivinnumálum, sigur seg verða sinnaðan at koma uppí málið, men hann dugir ikki at siga, hvussu málið skal loysast.

Uppskotið, hann nú fer at fáa frá Reiðarafelagnum, er at lata Fiskirannsóknarstovuna standa fyri eini kanning av russiska fiskiskapinum.

## Gamli Fame sokkin

Gamli rækjutrolarin Fame, tann fyrri rækjutrolarin, sum í 1986 varð seldur til Kanada, sakk herfyri, men øll manningin varð bjargað. Tað var so óheppið at tann eina plejlstongin brotnaðu og breyt seg út gjøgnum botnin, soleiðis at skipið fór at leka og sakk.

Tað var John Dam og aðrir sum lótu »Fame« byggja og hann førdi mangan farmin til lands. Hann varð seldur, tá John Dam legði til brots í nýggjari vinnu, at dreggja eftir skeljum undir Føroyum. Nýggi Fame fekk tað ikki at bera til við skeljunum og er eisini seldur.

## Sjúka tarnar fiskaarbeiði

Nógv arbeiði hevur verið hjá Fiskavirking á Tvøroyri seinastu tíðina, men herviliga influensan, sum hevur herjað landið hevur tarnað arbeiðinum. Onkran dagin hava heili 20 fólk verið við hús orsakað av kríminum, skrivar FF blaðið.

Men skipini landa regluliga og talan er fisk, sum er keyptur beinleiðis frá skipunum og eisini fisk, sum er keyptur av uppboðssøluni.

Seinasta mikudag var Rankin inni við 1300 kassum, tað er 130.000 pund av kongafiski og Vesturvarði var inni við 600 kassum av blálongu og í vikiskiftinum skuldi Vesturskin landa 6-700 kassar av blálongu.

## Veiddi fyri 700.000 kr í fýra mánaðar

Útróðrarbáturin Tóra úr Nólsoy hevur gjørt tað gott í ár saman við mongum øðrum útróðrarbátum. Hann hevur higartil í ár fiskað fyri 700.000 krónur, skrivar FF blaðið.

Rúni Poulsen eigur bátin og hann sigur, at í mars vóru teir á útróðri í 16 dagar og avreiddu fyri 320.000 krónur.

Teir eru ídnir umboðr á Tóru. Teir hava roynt við línu og hava ligið um 100 pund upp á stampin, onkran dagin tó væl yvir. Tá hann her fyri lá nakrar dagar við lágætt og tað ikki viðraði til línu, so stendu teir norður gjøgnum Sundalagið og út á Norðhavið. Teir vóru hepnir og fingu 8000 pund í fýra fylgjandi dagar. Teir lógu í Vík um náttina og svóvu umborð.

# Fiskimálaráðharrin hevur spælt dupultspæl

**Óli Jacobsen er ógvuliga harmur um at Fiskimannafelagið ikki er umboðað í fiskidaganevndini. Í FF blaðnum rør Óli Jacobsen fram undir at Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri hevur spælt dupultspæl í hesum leiki og hevur latið vinnunevndina gjørt tað skitna arbeiði. Hann skilir heldur ikki, at Heini O. Heinesen, sum formaður í Vinnunenvdini hevur útiloka umboðan fiskimannsins í Fiskidaganevndini**

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*





*Óli Jacobsen skilir ikki, at formaðurin í vinnunevndini Heini O. Heinesen og fiskimálaráðharrin, Jørgen Niclasen ikki vilja hava Fiskimannafelagið umboðað í Fiskidaganevndini*

Fiskimannafelagið hevur altíð roynt at verið við í teimum nevndum, sum hava beinleiðis ávirkan á korini hjá fiskimonnum. Fiskimannafelagið hevði lim í Skipannarnevndini, sum nú er avtikin og avloyst av fiskidaganevndini. Fiskimannafelagið roknaði sjálvsagt við eisini at fáa umboðan í fiskidaganevndini, men av eini ella aðrari orsøk, sum enn ikki er kend, so er fiskimannafelagið ikki umboðað.

– Eg veit ikki hvat er orsøkin. Uppskotið skuldi viðgerast í Fiskivinnuráðnum, og skrivarin sendi út til limirnar tað uppskotið, sum lá á borðinum í landsstýrinum. Sambært hesum skuldu í Fiskidaganevndini bara vera feløg, sum umboða veiðuhættirnar línu og trol. Hetta vildi so útiloka Fiskimannafelagið, sum umboðar allar veiðuhættir. Vit boðaðu fiskimálaráðharranum frá hesum og mótmælti. Hann segði at talan var um eitt mistak í umsitingini, sum hann vildi rætta, sigur Óli Jacobsen, formaður í Fiskimannafelagnum.

Jørgen rættaði mistakið og tá málið kom fram á ting vóru sjónarmiðini hjá Fiskimannafelagnum eisini við.

– Men tá málið kemur aftur úr Vinnunevndini, har Heini O. Heinesen er formaður, hevur nevndin eitt broytingaruppskot, sum burtursæð frá treytini um at limirnir skulu hava vinnu á sjónum, er júst tað sama uppskot sum var gjørt í Fiskimálastýrinum, men sum Jørgen segði var eitt umsitingarligt mistak. Her er ongin ivi um, at Jørgen hevur riðið á tveimum hestum og latið vinnunevndina gjørt tað skitna arbeiðið, sigur Óli Jacobsen, formaður í Fiskimálaráðnum.

– Eg dugi ikki at síggja, at vit ikki kunnu gera eitt gott arbeiði í Fiskidaganevndini. í Skipannarnevndini var ongantíð stríð innanhýsis, vit arbeiddu saman. Eg haldi eisini tað er skeivt, at fiskidaganevndin er skipað soleiðis í dag, at bara reiðararnir kunnu fáa teirra umboð og ikki fiskimaðurin. Veit ikki rættuliga hvørja ætlan Heini O. Heinesen, sum formaður í Vinnunevndini hevur við at útiloka fiskimannin í so týdningarmiklari nevnd, sigur Óli Jacobsen.

gult13 cyan13 magenta13 svart13

# ítróttur

Nr. 87 • týsdagur • 8. mai 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# HB og KÍ eiga bulin á kvinnulandsliðnum



*- Nú eru átjan spælarar eftir, og vit fara at halda fram at fyrireika okkum, sigur landsliðsvenjarin, sum um vikuskiftið tók út hópin til oyggjaleikirnar*

**Landsliðsvenjarin heldur, at spælararnir eru betri fyri, enn teir nakrantíð áður hava verið til altjóða uppgávur**

KVINNULANDSLIÐ
*Jóannes Hansen*

Sunnudagin hevði Álvur Hansen, venjari hjá kvinnulandsliðnum í fótbólti, eina ikki serliga hugaliga uppgávu. Hann ringdi til einar tíggju kvinnur, sum síðani síðst í januar hava strembað eftir at sleppa við kvinnulandsliðnum til oyggjaleikirnar í summar. Boðini til teirra vóru, at tær hesa ferð vóru ov stuttar og harvið ikki fara at teljast ímillum tær átjan, sum fyrst í juli fara niður á Isle of Man.

– Soleiðis eru treytirnar. Síðani vit 27. januar savnaðust fyri fyrstu ferð, hava kvinnurnar vitað, at átjan fóru at verða úttiknar, og tað vil siga, at einar tíggju tólv skuldu sáldast frá.

Spælararnir, sum hava fingið at vita, at tær skulu við kvinnulandsliðnum í fótbólti til oyggjaleikirnar eru úr átta feløgum. Tveimum donskum og seks føroyskum. Flestu spælararnir koma úr HB og KÍ. Hesi bæði feløgini hittust í Gundadali leygardagin. KÍ vann 4–0. Hjálparvenjari hjá Álvi Hansen er Jón Harald Poulsen. Hann er eisini venjari hjá KÍ, og teir vóru báðir í Gundadali leygardagin. Seinni í vikuskiftinum høvdu teir samansett liðið, sum skal niður á Isle of Man. Ímillum teir átjan spælararnar eru fimm úr KÍ og fimm úr HB.

Spælararnir eru hesir: Úr KÍ: Vivian Bjartalíð, Ragna Andreasen, Rannvá Andreasen, Malena Josephsen og Bára Skaale. Úr HB: Silja á Borg, Kristina Eyðbjørnsdóttir, Annika Hansen, Eyðfríð Kristiansen og Lydia Vesturtún. Úr B36: Sólvá Joensen og Maria Vang. Úr VB: Rannvá Augustinussen og Halltóra Joensen. Hinir spælararnir eru Oddvá Kristiansdóttir, B68, Anna Kristina Joensen, GÍ, Helga Ellingsgaard, Frederiksberg Boldklub, og Eyðvør úr Dímun úr B 1921.

### Spennandi avbjóðing

Landsliðið er í bólki við trimum øðrum, og skráin á oyggjaleikunum sær soleiðis út: Sunnudagin 8. juli eru tað vertirnir Isle of Man, sum Føroyar skulu spæla ímóti. Mánadagin 9. juli verður spælt ímóti Ynys Mon og mikudagin 11. juli skulu Føroyar spæla ímóti Cayman Island, sum er ein bretsk oyggj í Karibiska havinum.

A–landsliðið hevur ikki spælt, síðani tað luttóku í EM undankapping í 1995 og í 1996. Seks av teimum átjan spælarunum hava áður roynt seg á landsliðnum. Tær eru Eyðvør úr Dímun, Helga Ellingsgaard, Kristina Eyðbjørnsdóttir, Sólvá Joensen, Eyðfríð Kristiansen og Bára Skaale.

Álvur Hansen og Jón Harald Poulsen hava tey seinastu árini havt ábyrgdina av U–18 kvinnulandsliðnum, og venjarin heldur, at uppgávan á oyggjaleikunum er ein spennandi avbjóðing:

– Felags fyri spælararnar, sum ikki hava verið á a-landsliðnum áður, er, at tær hava roynt seg á U-18 landsliðnum, sum hevur verið við í EM undankappingum tey seinastu árini. TÍ eru oyggjaleikirnir ein náturlig og spennandi avbjóðing hjá teimum.

*Hvat roknar tú við?*

– Eg kenni millum lítið og einki til mótstøðulondini. Sjálvandi verður tað ein stór uppgáva í fyrsta umfarinum at spæla ímóti vertstjóðini, men vit gera tað, sum vit kunnu fyri at fyrireika okkum væl. Frá 27. januar og fram til byrjanina av steypakappingini vóru vit saman hvørt vikuskifti. Síðani hava vit verið saman umleið aðru hvørja viku. Nú eru átjan spælarar eftir, og vit fara at halda fram at fyrireika okkum.

*Hvussu heldur tú fyritreytirnar eru fyri góðarí úrtøku?*

– Sum eg segði, so kenni eg ikki enn nakað serligt til mótstøðuliðini. Men eg haldi, at føroysku spælararnir eru betri fyri, enn teir kanska nakrantíð áður hava verið.

*Hvussu tá?*

– Felags fyri allar spælararnar er, at tær duga væl at spæla fótbólt. Eg haldi ikki, at fótbóltsliga breiddin nakrantíð hevur verið so stór á nøkrum kvinnuliði í Føroyum, sum hon er ímillum tær átjan kvinnurnar, sum nú eru úttiknar. Um vit meta út frá føroysku landskappingini, so hava vit úttikið fáar verjuspælarar. Men tað vil ikki siga tað sama sum, at tað ikki fara nóg nógvir verjuspælarar við landsliðnum til Isle of Man. Í feløgunum verða bestu spælararnir ofta settir á miðvøllin. Men tað eru fleiri av teimum, sum eisini eru heilt góðir verjuspælarar, sigur Álvur Hansen.

## Kvinnurnar stóðu seg væl

Føroysku kvinnrunar vunnu B-bólkin á Scilly oyggjunum, meðan menninir gjørdust nr. 62

Rógving
Jákup Mørk

Føroysku bátarnir á Scilly Oyggjunum róðu um kapp hetta vikuskiftið. Í mun til undanfarin ár var kappingin væl harðari. Luttøkan hevði sett met við 78 bátum, og tá talan har umframt eisini var um tvær nýggjar føroyskar manningar, so sást hetta eisini aftur á úrslitunum.

Menninir av Argjabátinum hava ongantíð róð í slíkum bátum áður, og tað var skjótt greitt, at tað ikki var millum teir fremstu, at teir skuldu gera seg galdandi. Í seinasta róðrinum kappaðust teir um plásssini frá 61 og niðureftir, og her gjørdust teir næst fremstir, soleiðis at endastøðan gjørdist nr. 62.

Vóru í A-bólkinum

Kvinnumanningin av Frúnni, Jarnbardi og Hvessingi vann B-finaluna, og gjørdist sostatt nr. 12, men vildi væl til, kundi talan verið um eina enn hægri plasering. Í næst seinasta róðrinum fluttu tær nevnliga niður úr A-bólkinum, og hóast tað sjálvandi er harmuligt, so staðfesti avrikið enn einaferð, at føroysk róðrarfólk so avgjørt einki hava at skammast um, tá kappast verður í altjóða høpi.

## Kappingin útsett

Kappingin um eina ferð til fótbóltsdyst í Keypmannahavn skuldi av røttum verið avgjørt í dag. Ígjøgnum 15 útgávur av Sosialinum hava lesararnir havt møguleika at savna saman prikkar til eitt putlispæl, og samanlagt skapa hesir eina mynd av einum kendum fótbóltsandliti.

Eftir ætlan skuldi so dragast um endaliga vinnaran í dag, men hetta er so útsett í eina viku. Sostatt hava teir lesarar, sum av einhvørjari orsøk ikki hava sent seðlarnar inn, enn ein møguleika at sleppa við í lutakastið.